

## Betri eftirlit við fíggjarheiminum

Týski forsetin, Horst Köhler, heldur, at myndugleikarnir í teimum einstøku londunum eiga at útvega sær betri eftirlit við fíggjarkervinum. Áheitanin kom í teirri árligu Berlin-røðuni hjá forsetanum, og eygleiðarar siga, at tað er neyvan av tilvild, at forsetin kom við júst hesari áheitanini nakrar dagar undan toppfundinum hjá G20-londunum. Horst Köhler hartaði bankar og stórileggjarar, sum hann legði undir ábyrgdarloysi og fyri at hava lagt ov lítlan dent á vit og skil. Tí er trøvur á morali, reglum og betri eftirliti, segði týski forsetin.

## Færri álop í Irak

Ein uppgerð hjá amerikanska hervaldinum í Irak vísir, at álopini har eru fækkað nógv í seinastuni. Ein talsmaður hjá herleiðsluni segði í gjár, at álopini hava ongantíð verið so fá síðani innrásina í 2003. Á einum tíðindafundi í Bagdad segði talsmaðurin, David Perkins, at samanborið við juni í 2007 eru álopini fækkað umleið 90 prosent. Tá vóru álopini umleið 1.250 í tali um vikuna, men nú eru tey færri enn 100, segði hann. Heilt friðarligt er tað kortini ikki. So seint sum mánadagin kravdu tvær sjálvmorðsbumbuatsóknir 35 mannalív.

# Fyri rørslutarnað – langt um leingi



*Landgongin hevur staðið í hálvum gekki á molanum í Nólsoy í fleiri mánaðir, men nú skal so restin gerast, so hon kann takast í nýtslu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í fleiri mánaðir hevur ein hálv landgongd staðið á molanum í Nóloy, har Ritan leggur at. Nú lovar Strandferðslan, at hon verður klár at taka í nýtslu fyrsta dagin, so fólk í koyristóli eisini sleppa umborð**

LANDGONGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nólsoyingar hava áhaldandi gjørt vart við, at atkomu viðurskiftini umborð á Rituna ikki hava verið tíðarhóskandi. Eitt nú hevur verið ógjørligt at sloppið umborð á strandferðsluskipið í koyristóli, og tá nólsoyingar eiga ein ungan mann, sum er tengdur at einum slíkum, sigur tað seg sjálvt, at verandi landgongd ikki er nøktandi.

Strandferðslan hevur síðani tikið málið upp, og fyri nøkrum mánaðum síðani kom so ein hálv landgongd at standa á molanum í Nólsoy, har sum Ritan leggur at.

Conrad Gaard Joensen frá Strandfaraskipum Landsins sigur, at hetta er tað, sum teir eru komnir ásamt við Tórshavnar Havn um.

- Arbeitt hevur verið við málinum í longri tíð, og nú er so komið hartil, at tað er klárt at seta seinna partin saman við tí partinum, sum stendur í Nólsoy, sigur Conrad Gaard Joensen.

Nýggja landgongdin er gjørd soleiðis, at talan er um ein rímiliga langan og ikki so brattan skráning, har koyrast kann upp eftir við koyristóli. Síðani skal ein brúgv gerast frá hesum rampanum yvir á Rituna, og tað er hesin parturin, sum manglar.

- Hann er um at verða liðugur, og skuldi verið klárur at montera í hesari ella í seinasta lagi í næstu viku, sigur Conrad Gaard Joensen.

Nú ber so ikki til at taka hendan nýggja landgangin í nýtslu í løtuni, tí Ritan liggur til motoreftirlit inni í Runavík, og kemur ikki aftur í sigling fyrr enn væntandi síðst í komandi viku.

Samstundis, sum nýggja landgongdin verður gjørd liðug, verður eisini ein gálgi settur upp á molanum í Nólsoy soleiðis, at manningin sjálv kann leggja skipið av landi við at binda í henddan gálgan.

- Nýggja landgongin er gjørd til Rituna. Verður talan um annað skip má so okkurt annað gerast. Verður tað Ternan, sum frameftir fer at røkja farleiðina, ber sjálvandi til at koyra inn á dekkið um bilrampuna, sigur Conrad Gaard Joensen.

Men fyribils verður so hetta loysnin at fáa fólk í koyristóli umborð á Rituna.

# Býarmyndin broytist



*Ein heldur óvanlig sjón hjá Havnarfólki. Sam liggur í plássinum hjá Glen Rose II, sum er »forvíst« til ferjuleguna hjá Norrönu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Glen Rose II, sum í longri tíð hevur ligið við molan á Bursatanga, er nú flutt yvir á atløgusíðuna við ferjuleguna hjá Norrönu, fyri at geva pláss fyri Sam**

BÝARMYND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Havnarfólk ganga í hesum døgum og undra seg um, at Glen Rose II, sum annars er vorðin ein institutión við havnalagið í Havn – og sambært eigaranum allarhelst kemur við í næstu bókini, »Gamlar Havnarmyndir« – ikki liggur á sínum vanliga plássi við molan á Bursatanga, men er flutt til atløgubryggjuna við ferjuleguna hjá Norrönu.

Samstundis hevur strandfaraskipið Sam tikið yvir plássið hjá Glen Rose II, og tað er í sambandi við, at eitt annað skip hjá SSL, Ritan, liggur inni í Runavík, har motorurin er til høvuðseftirlit.

Ritan røkir vanliga siglingina til Nólsoyar, men nú hon er til eftirlit, røkir Sam hesa rutuna. Sam siglir annars á farleiðini til Kallsoynna, men hevur verið á sleipistøð á MEST í Havn í longri tíð. Teir hava havt skrúvutoyið úr og tað hevur verið í Danmark til umvælingar, har millum annað bløðini eru skift.

Meðan Sam hevur verið á sleipistøð, og nú, meðan Sam røkir siglingina fyri Rituna, er Ternan sett inn á farleiðini millum Kallsoy og Klaksvík.

- Motorarnir skulu til eftirlit við jøvnum millumbilum, og hetta er nakað, sum hevur ligið í kortunum leingi. Gongur alt sum ætlað, kemur Ritan í sigling aftur síðst í næstu viku, sigur Jóan Petur Abrahamsen, inspektørur á Strandferðsluni.